## DAGSINS MEINING

# Besta feriutíð - vantandi møguleikar

Vit stunda ímóti bestu feriutíð, og longu nú hava mong ferðafólk verið at sæði í havnargøtum, á landsvegunum og Yviri við Strond hava tjøld og húsvagnar verið at sæð. Tað eru nógv - fleiri og fleiri - sum velja sær henda ferðingarháttin. Tey eru frí, og kunnu sjálvi leggja ferð sína tilrættis.

Veðrið kunnu vit ikki gera nakað við, men vit kunnu skapa teimum, sum ferðast á henda hátt, betri umstøður. Í Degi og Viku týskvøldið sóu vit tjaldingarstaðið Yviri við Strond, niðurdottin tjøld, men kortini væl nøgd ferðafólk, tí tey høvdu roknað við, at slíkum veðri kundu tey møta í Norðurhøvum.

Men tá tosað verður við fólk, sum ferðast á henda hátt, halda "kampistarnir", at umstøðurnar í Føroyum átti at verið nógv betri. Vit hava bara havt tað eina tjaldingarplássið higartil, men nú hevur Eiðis kommuna latið eitt tjaldingarpláss gera.

Nú hava vit so tvey skipað tjaldingarpláss, umframt plássið hjá Skótadeplinum á Selatrað, men tjaldingarplássið í Havn er so vánaligt, samanborið við tjaldingarpláss í t.d. Íslandi og Hetlandi, at her er einki samanberingargrundarlag. Ein góðveðursdag er sjálvandi hugnaligt Yvir við Strond, men kemur hann lágt og vindurin er nógvur er ikki tespiligt at halda til har.

Havnar kommuna, sum spirnnur mest burtur úr ferðavinnuni, átti tí at tikið sær um reiggj og fingið okkum eitt nýtt tjaldingarpláss. Vit minnast jú, hvat umboðsmaðurin fyri hollendsku kampingfólkini segði herfyri. Tveir dagar eftir lýsingina varð útselt - 25 høvdu teknað seg til at fara við húsvognum til Føroya, men vit kunnu ikki taka ímóti so nógvum!!!

Eiðis kommuna hevur í fleiri ferum gingið á odda og brotið upp úr nýggjum, og tað er tí at fegnast um, at eiðisfólk nú hava latið eitt tjaldingarstað gera. Tillukku við tí. Vit hoyra fólk í útjaðaranum siga, at eingi ferðafólk koma út um høvuðsstaðarøkið. Men eru umsøðurnar í lagi, koma ferðafólkini óivað eisini.

Nú hevur Ferðaráðið latið økisfaldarar gera saman við Økisferðavinnufeløgunum. Hetta frálíka tiltak fer óivað eisini at gera sítt til, at fleiri ferðafólk koma kring landið. Nú er bara at vóna, at myndugleikin av álvara vaknar. Vit hava eitt vlvirkandi og virkið ferðaráð, nógv fólk í vinnuni, sum gera eitt stórt, ofta filantropiskt arbeiði, men sum renna seg ímóti alla tíðina, tí vælvildin avmarkað, tá tað kemur til stykkis.

Ferðavinnan er heimsins størsta vinna, og skulu vit hava fleiri bein at standa á, mugu vit eisini halda fram at byggja út, og í hesum sambandi hugsa um tjaldingarpláss og fleiri møguleikar enn bara at síggja náttúruna. Ferðafólk skulu hava møguleikar at sleppa at royna seg meiri.

**Sosialurin**




*Tað verða sett nógv hægri krøv en í dag til bussarnar, sum fara at koyra undir nýggju skipanini hjá Bussleiðini*

# Bøta um Bussleiðina

**Ætlanin við nýggju koyriskipanini hjá Bussleiðini er at gera leiðina nógv meira effektiva, sigur formaðurin í Teknisku Nevnd hjá Tórshavnar Býráð**

BUSSLEIÐIN
*Edvard Joensen*

Bussleiðin skal bjóðast út av nýggjum og effektiviserast munandi, sigur Sjúrður Olsen, formaður í Teknisku Nevnd Tórshavnar Býráðs.

Hann sigur, at kannað hevur verð yvir eitt longri tíðarskeið, hvussu bøtast kann um raksturin á Bussleiðini, sum ikki verður hildin at vera nøktandi.

Bussleiðin hevur árliga eitt undirskot upp á einar 11 milliónir krónur, sum borgararnir í Havn gjalda, vísir hann á. Samlaði kostnaðurin er 14,8 milliónir, og munurin har í millum eru so inntøkurnar.

Kanningarnar vísa, at sunnudag brúkar næstan eingin bussin, sigur Sjúrður Olsen. Eini 60 til 100 fólk soleiðis alt í alt. Sama er leygarkvøld. Tí er gjørt av, at í nýggja útbjóðingartilfarinum skal eingin koyring vera frá klokkan 17 leygardag til mánamorgun.

Trýstið á bussarnar er um morgunin fram móti klokkan tíggju, og so aftur seinnapart, tá skúlarnir eru lidnir. Tað eru mest skúlanæmingar og pensionistar, sum brúka bussarnar, sigur Sjúrður Olsen.

Hinvegin fer so at vera gjørt væl meira burtur úr koyringini hinar dagarnar, tá bæði fleiri túrar veðra koyrdir, eins og koyrt verður seinni á kvøldi.

Uppskot hava verið frammi um at koyra við 20 minutta millumbili. Men tað fer illa at bera til, sigurt Sjúrður Olsen, tí tað krevur einar tríggjar bussar og einar fimm milliónir afturat inn í verandi skipan.

Í nýggja útbjóðingar-tilfarinum verða munandi strangari krøv sett bussunum, sum fara at koyra, enn tað eru í dag. Til dømis verður elsti bussurin, sum fer at byrja í nýggju skipanini, í mesta lagi trý ára gamal, og støðið verður av sær sjálvum nógv hægri, enn tað er nú.

Nýggja útbjóðingar-tilfarið verður lagt fram á býraðsfundi í Havn í kvøld. Ætlanin er at bjóða koyringina út í næstu viku, og at tilboðini skulu vera inni aftur í august.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

# ítróttur

Nr. 115 • hósdagur • 20. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# David feldi Goliat

**Suður Korea vann 2-1 á Italia í áttandapartsfinaluni, og vertstjóðin skal nú spæla ímóti Spania næsta umfari**

HM
*Stefan í Skorini*



*Stór frøi var í Suður Korea týsdagin, tá landsliðið vann 2-1 á Italia. Næsta mótstøðuliðið er Spania, sum neyvan fær lættan dyst móti vertstjóðini*

Enn ein sensatión gjørdist veruleiki týsdagin, tá Suður Korea sera óvæntað vann á Italia. Vanligi dysturin endaði við javnleiki 1-1, men Suður Korea fekk gylta málið tríggjar minuttir áðrenn longda leiktíðin var av. Ahn Jung-hwan skoraði málið, og hann man vera tjóðarhetja í lítla asiatiska landinum í hesum døgum.

Suður Korea legði hart út og fekk eitt brotsspark longu eftir fýra minuttir, tá Christian Panucci hálaði ein koreanara niður í brotsteiginum. Ahn Jung-hwan skuldi skjóta, men málverjin Gianluca Buffon bjargaði. Hetta var næsta brotssparkið, sum Korea brendi í hesum endaspælinum. Tó hava tað verið tveir ymiskir skjúttar.

Eftir hetta fekk Italia meira tamarhald á dystinum og hættaði sær longri fram á vøllin. Hetta gav úrslit eftir átjan minuttir, tá Christian Vieri skallaði eitt hornaspark í netið.

Henda støðan helt sær heilt fram til 87. minutt, tá tað endiliga eydnaðist Suður Korea at skora. Soel Ki-hyeon fangaði ein bólt, ið datt fyri føturnar á honum í brotsteiginum, og hann skeyt fyrstu ferð.

Hóast lítil tíð var eftir, fingu bæði liðini stórar málmøguleikar eftir hetta. Christian Vieri hevði óivað tann største, tá hann kom at standa púra leysur í málteiginum, men skotið fór uppum. Korea hevði eisini tvær góðar royndir á málið, áðrenn dómarin bríksladi dystin av, men málverjin bjargaði í báðum førum.

### Totti fekk reytt

Í longdu leiktíðini var dramatikkurin ikki minni. Francesco Totti fekk sítt næsta gula kort og varð tískil rikin av vølli í fyrra hálvleiki av longdu leiktíðini. Hetta fekk øði í italienarar, sum tó vóru nær við at avgera.

Fyrst fekk Gennaro Gattuso ein gyltan møguleika, tá hann bleiv leysur við málverjanum, sum tó gjørdi eina rimmar bjarging, og síðani varð vinkað fyri rangstøðu, tá Damiano Tommasi gjørdist leysur og skoraði. Stórur ivi var um hesa avgerð.

Tá tríggir minuttir vóru eftir at spæla fekk Suður Korea avgerandi málið. Ahn Jung-hwan, sum dagliga spælir við Perugia í Italia, leyp upp og høvdaði eitt innlegg í netið. Suður Korea spældi seg tískil víðari í HM-endaspælinum og skal møta Spania í fjórðingsfinaluni.

Í 1966 vann Norður Korea á Italia, sum tá fall í bólkaspælinum. Tá tveittu áskoðarar rotin egg eftir leikarunum á flogvøllinum, tá teir komu heimaftur.

Italsku spælararnir, venjarin og umboð frá italska fótbóltssambandinum vóru í øðini inn á dómaran eftir dystin. Øll mettu, at dómarin hevði snýtt Italia fyri eitt mál, og at reyða kortið als ikki skuldi verið givið. Fleiri tosa nú um eina samansvørjing móti Italia, tí liðið hevur fingið fleiri avgerðir ímóti sær.

Av teimum átta liðunum í fjórðingsfinaluni hava fýra teirra ongantíð fyrra staðið seg so væl í einum HM-endaspæli. Tey eru USA, Suður Korea, Senegal og Turkaland.

<u>Suður Korea – Italia 2-1</u>
0-1: Christian Vieri
1-1: Soel Ky Hyeon
2-1: Ahn Jung Hwan

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Ronaldo | Brasilia | 5 |
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Rivaldo | Brasilia | 4 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Christian Vieri | Italia | 4 |
| Marc Wilmots | Belgia | 3 |
| Robbie Keane | Írland | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Fernando Morientes | Spania | 3 |
| Raul González | Spania | 3 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 3 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Jared Borgetti | Mexico | 2 |
| Nelson Cuevas | Paraguay | 2 |
| Henri Camara | Senagal | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Ahn Jung-Hwan | Suður Korea | 2 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 2 |
| Umit Davala | Turkaland | 2 |
| Brian McBride | USA | 2 |
| Landon Donovan | USA | 2 |

## Fjórðingsfinalur í HM-endaspælinum

**Fríggjadagin 21. juni:**
Kl. 7.30: England – Brasilia (í Shizuoka, Japan)
Kl. 12.30: Týskland – USA, (í Ulsan, Suður Korea)

**Leygardagin 22. juni:**
Kl. 7.30: Spania – Suður Korea (í Gwangju, Suður Korea)
Kl. 12.30: Senegal – Turkaland (í Osaka, Japan)

# Brasilia var ikki sannførandi

**Brasilia megnaði sum væntað at basa Belgia, men brasilska liðið spældi ikki væl, og Belgia hevði fleiri góðar møguleikar**

HM
*Stefan í Skorini*

Dysturin millum Belgia og Brasilia mánadagin gjørdist nógv meira spennandi, enn tey flestu høvdu væntað. Í veruleikanum vóru reyðu djevlarnir úr Belgia nær við at skapa eina stóra sensatión.

Braslilia fekk eina betri byrjan uppá dystin enn Belgia og hevði nakrar møguleikar tíðliga í dystinum, men tað brasilska álopið við Ronaldo og Rivaldo dovnaði sum dysturin leið.

Belgia legði seg hinvegin ikki aftur á vøllin, men stóð fyri góðum álopsfótbólti. Fleiri ferðir vóru teir ógvuliga nær við at skora, men málverjin hjá Brasilia, Carlos, hevði ein góðan dag í málinum.

Marc Wilmots høvdaði einaferð bóltin inn í fyrra hálvleiki, men dómarin kolldømdi málið, tí hann metti, at Wilmots hevði skumpað verjuleikaran í ryggin. Hetta var tó ein óskiljandi avgerð, og venjarin hjá Belgia, Robert Waseige, fanst hvassliga at dómaranum fyri hesa avgerð.

### Rivaldo og Ronaldo

Brasilia hevur tveir sera vandamiklar álopsleikarar, og hesir báðir avgjørdu dystin. Miðskeiðis í seinna hálvleiki tók Rivaldo ein bólt hegnisliga niður uttanfyri brotsteigin. Hann langaði til, og bólturin rakti ein verjuleikara í fótin, og tað snýtti málverjan. So var støðan 1-0, hóast tað var Belgia, sum hevði havt fleiri vandamikil álop eftir steðgin.

Belgia royndi at trýsta tað, sum eftir var. Belgiska liðið sendi fleiri leikarar fram á vøllin, og hesum gjørdi brasilisa sær dælt av. Kleberson spældi Ronaldo leysan, sum skeyt sítt fimta mál í hesum endaspælinum. Hann er nú toppskjútti saman við týskaranum Miroslav Klose.

<u>Brasilia – Belgia 2-0 (0-0)</u>
1-0: Rivaldo
2-0: Ronaldo